# SLAN




*Hundratals politistar leita eftir »nýggja lasermanninum« í Malmø*
MYND: POLFOTO

## FAKTA

**Soleiðis sær maðurin út:**

- ✗ Umleið 30 ára gamal
- ✗ Ljósa húð
- ✗ Vaggandi gongulag
- ✗ Einsamallur
- ✗ Væl kendur í umráðnum
- ✗ Planleggur alt væl
- ✗ Skýtur móti yvirkroppinum
- ✗ Skýtur bara í myrkri

*»Politistarnir eru óvanliga sjónligir og vælmannaðir í Malmø*

tosa nógv um, at Svøríki er vorið eitt meira rasistiskt land enn áður. Í Suðursvøríki, har størsti býurin er Malmø, fingu SvøríkisDemokratarnir flest atkvøður, og nógv av teimum sita nú og stýra í kommunum í sunnara parti av Svøríki.

Alt hetta ger, at innflytarar í Svøríki kenna seg forfylgd. Í Malmø tora fólk ikki út og nú »nýggi lasermaðurin« eisini skýtur inn í húsini, hava fleiri keypt sær myrkar persiennir.

– Hesin maðurin forpestar okkara bý, segði ein journalistur á blaðnum Sydsvenskan.

Ein tann seinasta hendingin var fyri nøkrum vikum síðani, tá ein eldri maður var skallaður av hesum sama manni. Eftir ta hendingina vónaðu politistarnir, at tað bar til at finna DNA frá honum, men enn er tann kanningin ikki liðug.

Nógv sjálvboðin eru eisini úti og royna at gera Malmø til ein eins tryggan bý, sum hann hevur verið, men politiið mælir frá, at fólk taka sakina í egnar hendur.

Elsa Bech hevur bara rósandi orð at geva politinum í Malmø.

– Eg haldi at politistarnir eru óvanliga sjónligir og vælmannaðir í Malmø. Er nakað, so eru teir á staðnum beinavegin, sigur hon.

Politistar úr øllum Svøríki leita nú eftir manninum og vónandi verður veiðieydnan betri, enn hon hevur verið seinasta árið.

## HETTA ER HENT SEINASTA MÁNAÐIN

**10. oktober, Lønngatan**
47-ára gamli Basi Hassan úr Somalia stendur í bussskýlinum og bíðar eftir bussinum. Verður skotin niður aftanífrá. Hann yvirlivir, men er illa særdur.

**19. oktober, Eriksfæltsgatan**
28-ára gamal myrkur maður bíðar eftir bussinum og verður skotin niður aftanífrá. Verður illa særdur.

**21. oktober, Hermodalstorget**
16-ára gamal drongur meldar, at onkur hevur skotið eftir honum, men ikki rakt.

**21. oktober, Kroksbæck**
Tvær kvinnur melda, at onkur hevur skotið inn gjøgnum vindeygað í teirra íbúð. Tær fáa minni snuddir.

**22. oktober, Cronquists gata**
30-ára gamal meldar, at onkur hevur skotið eftir honum, og at ein maður rann av staðnum.

**2. november, Rosengård**
Fleiri persónar boða politinum frá, at skotið verður í býarpartinum Rosengård í Malmö